# Smyril á Vági

Sjáldsamur gestur vitjaði Vág sunnudagin. Um 12:30 tíðina í gjár sigldi Smyril inn á Vág. Ætlanir eru um at nýta Vág sum bunkringshavn, og í gjár royndi Smyril bryggjuna við Vágsverkið. Smyril hevur bunkrað á Sundi, men ætlanir eru um, at framyvir skal Smyril bunkra olju í Vági. Umstøður eru við bryggjuna við Vágsverkið hjá SEV - har stóru oljutangarnir standa, og sunnudagin kom Smyril á Vág at royna umstøðurnar. Veðrið var av tí fagrasta, og tað sá út til, og ongir trupulleikar vóru, og væl gekst at koma til og frá. Men hvussu verður við ætlanunum um bunkring í Vági frættist óivað meira um seinni. Nú hevur Smyril roynt umstøðurnar í Vági, og Smyril gjørdi skjótt av, tí um 13 tíðina í gjár fór hann norður aftur á Krambatanga.



# Norðurkorea ávarar USA

Norðurkorea vil vera við, at USA hevur nógvar kjarnorkurakettir, sum eru vendar ímóti landinum, og stýrið í Pyongyang ávarar um, at tann amerikanska hóttanin kann enda við einum kjarnorkukríggi á koreanska nesinum. Blaðið Rodong Simmun, sum myndugleikarnir í Norðurkorea geva út, skrivaði í gjár, at USA hevur nú 1.000 kjarnorkuløðingar í Suðurkorea, sum eru vendar ímóti málum í Norðurkorea. Um vikuskiftið hevur norðurkoreanska stjórnin fleiri ferðir mótmælt, at trygdarráðið hjá ST hevur samtykt at herða tiltøkini ímóti landinum. Bæði Kina og Russland tóku undir við samtyktini.











melodisk og klár ljóðar hon. Vónandi er hetta ikki nakað fornermilsi.

Í heila tikið var ein summarligur tóni yvir konsertini. At styrkja um ta kensluna, kundi ein bert líta at pallinum, sum var pyntaður til eina uttandura veitslu við litføgrum ljósperum hangandi úr loftinum, og glaðum fólki í sang og spældi.

## Einglarøddin millum sterku mennirnir

Tónleikararnir hjá Guðrið vóru væl upplagdir hetta kvøldið, og vóru uttan iva súlan undir eini konsert, sum bara skal eydnast væl. Ein stórur partur av manningini er tann sama, sum Budam fyri tveimum árum síðan bergtók sínar gestir við, og forklárar tað kanska ein part av góðu upplivingini.

Eitt eru hjálpartónleikarar. Stjørnan hetta kvøldið var tó Guðrið Hansdóttir. Alt við henni tóktist so gjøgnumtonkt og væl tilrættislagt. Líka sum á Love is Dead, hevur hon gjørt sær ómak við at heildin skal vera í lagi. Hennara vørumerki eru uttan iva sermerkta reyða hárið og teir glitrutu kjólarnir. Og so sjálvandi vakra røddin, sum á nýggju útgávuni kemur betri til sín rætt enn fyrr. Á ein ella annan hátt tykist tað sum at hon “hoyrist” betri. Um tað er tilætlað, ella um yvirritaða'sa seina reaktión, skal støða ikki takast til. Men eitt klókt val, um tað er fyrri valmøguleikin.

Um vit venda aftur til frálíku løgini hjá Guðrið Hansdóttir, sum vit vóru so heppin at uppliva í Sjónleikarhúsinum leygarkvøldið, skal lagið Sleep takast fram. Eitt fantastiskt lag, sum er næst seinasta lag á fløguni, og eitt perfekt lag til at enda eina konsert við. Her sungu Guðrið Hansdóttir og Ása Wraae eina duett, sum riggaði fantastiska væl.

## Gjøgnumførda Guðrið

Eitt gott tekin um at eingin slingur er í valsinum, er flotta uppsetingin inn í Sjónleikarhúsinum. Hennara góði vinur, Heiðrik á Heygum, hevur tikið myndir og gjørt húsan til The Sky is Opening, líka sum hann eisini stóð fyri hesi uppgávu á Love is Dead. Á myndunum sæst Guðrið sitandi á einum karruselhesti, og hesin hevði fingið eitt heiðurspláss aftast á pallinum. Sama søga er við kjólunum, sum Guðrið framførdi í leygarkvøldið. Teimum er hon eisini avmyndað í.

Skal takast saman um, var útgávukonsertin hjá Guðrið Hansdóttir ein gleðilig tónleikaupplivíng. At Guðrið hevur fólkatekki, kann staðfestast eftir stóra áhuganum, sum var fyri konsertini var. Tað tók stutta tíð at selja øll atgongumerkini, og at seta eina nýggja konsert á skránna. Tá konsertin hjá Guðrið Hansdóttir var komin at enda, høvdu síðumaðurin og yvirritaða bara hug at vera sitandi og lurta eftir seinnu konsertini, bara fyri góða tónleikin eina ferð enn.

Uttan fyri var lýtt og ljóst, og fólk leitaði sær oman eftir móti miðbýnun. Fleiri okkara murrandi, og við nýkeyptari fløgu og plakat við Guðrið ríðandi á einum karruselhesti undir arminum.